# Símun Absalonsen segði seg úr sessinum

**Í svari til Mentamálaráðið um Símun Absalonsen kann vera formaður í stýrinum fyri Kringvarpið, segði Skráseting Føroya í gjár, at løggildur grannskoðari ikki kann átaka sær almennar starvsuppgávur**



*Lagið var gott, tá kringvarpsstýrið kom saman í gjár. Formaðurin, Símun Absalonsen, møtti tó ikki, og seinni fættist, at hann segði sessin frá sær*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Herfyri kom Jógvan Elias Winther Poulsen, advokatur, til ta niðurstøðu, at allir fýra limirnir í nýggja kringvarpsstýrinum, sum vóru hildnir at vera ógegnigir, vóru gegnigir.

Tó hevur spurnartekn verið sett við, um formaðurin, Símun Absalonsen, kann sita í stýrinum, av tí at hann er løggildur grannskoðari.

Mentamálaráðið hevur spurdi seg fyri hjá Skráseting Føroya um hetta mál, og haðani varð upplýst, at sambært § 10 í lógini um løggilda grannskoðan er høvuðsreglan, at løggildur grannskoðari ikki kann átaka sær almennar starvsuppgávur.

**Strangari reglur**

Í skrivinum til Mentamálaráðið frá Skráseting Føroya verður m.a. sagt, at *“Skráseting Føroya hevur 22. januar 2007 havt samband við 'Revisorkommissionen' um hetta mál. Galdandi føroyska grannskoðaralóg er tann sama sum fyrr galdandi danska lógin. Úr 'Revisorkommissionen' varð sagt, at í DK var var forboðið í teirra gomlu lóg, sum svarar til § 10 í galdandi føroysku lógini, tulkað rættiliga strangt. Tað merkti, at grannskoðarar bert kundu átaka sær onnur størv ella uppgávur, um tað var heilt privat, so sum limur í nevndini í vøggustovu/barnagarði el.líkn. har barnið hjá teimum gongur.*

*Men eftir strongu tulkingini í DK, mátti grannskoðari ikki átaka sær nakað annað alment starv ella yrki.*

*Einasta undantakið var politikari. Sum valdur kommunalpolitikari, kann ein grannskoðari vera formaður í ymsum kommunalum nevndum – tó ikki øllum - enntá eisini borgarstjóri.*

*Grundgevingin er tann, at tað er borgarligt umboð at vera politiskt valdur.*

*Í DK er lógin síðani broytt fyri at fylgja ES-reglum, og nýggja danska lógin er ikki so strang á hasum økinum. Har verður hugt at ítøkiliga málinum, tá støða skal takast til um grannskoðara-starvið kann sameinast við annað yrki. Um grannskoðarin í ítøkiliga málinum kann átaka sær júst hetta starvið afturat, og samstundis varðveita starvi sum grannskoðari.*

*Galdandi føroyska og gamla danska grannskoðaralógin inniheldur almenna/generella forboðið ímóti, at grannskoðarar yvirhøvur kunnu átaka sær onnur almenn størv. Tulkingin í DK var, at bert fá undantøk eru frá hesum forboðnum”.*

**Møtti ikki á fundi**

Sum løggildur grannskoðari hevur Símun Absalonsen sostatt ikki heimild til at sita í almennum nevndarsessi. Frávik frá hesi meginregluni kunnu tó gerast, um søkt verður um hetta, men hann møtti ikki á fyrsta fundinum hjá Kringvarpinum í gjár og seinni fættist, at hann hevði sagt seg úr sessinum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur við Sosialin, at enn er eingin nýggjur formaður settur, og sostatt er varalimurin, Durita Djurholm, virkandi formaður í stýrinum fyri Kringvarpið. Landsstýrismaðurin sigur seg arbeiða við at finna nýggjan formann.

# Sambandsflokkurin brúkar hesa vikuna at tosa við Alfred

**- Tað gongur nokk hendan vikan, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, um støðuna Alfred Olsen í Løgtinginum**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Innanfyri og uttanfyri. Alfred Olsen er hvørki partur av samgonguni ella andstøðuni*

Herfyri segði Jóannes Eidesgaard, samgonguleiðari og løgmaður, við Sosialin, at í málinum um Alfred Olsen lá bólturin hjá Sambandsflokkinum.

Alfred Olsen segði seg 21. desember í fjør úr samgonguni. Hann varðveitti tó sín formanssess í Løgtingsins rættarnevnd, og bæði Alfred Olsen sjálvur, formaður Javnaðarfloksins á tingi, Kristian Magnussen, og formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, hava sagt, at Alfred Olsen er ikki partur av andstøðuna á tingi.

**Tosa saman**

Sostatt er Alfred Olsen hvørki partur av samgonguni ella andstøðuni, men sjálvur hevur Alfred Olsen samanborið sín leiklut við tann hjá Kára P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum, sum er í valbólki við samgonguni.

Enn er tó ikki greitt, um vend kemur í málið.

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, sigur við Sosialin í dag, at tey samskifta við Alfred Olsen um málið, men at einki nýtt er at frætta enn.

- Tað gongur nokk hendan vikan, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Umrøður avloysa minningarorð í Útvarpinum

**Umrøður í tíðindasendingunum í Útvarpinum avloysa minningarorð um farin ting- og landsstýrisfólk**

FJØLMIÐLAR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg, javnaðartingmaður, fýlist á, at Útvarpið ikki hevði minningarorð um fyrrverandi partamannin, Jógvan Adolf Johannesen, sála, sum andaðist herfyri.

Hetta skrivar Gerhard Lognberg í minningarorði um Jógvan Adolf Johannesen í bløðunum í gjár.

Men sambært Jógvani Jespersen, kringvarpsstjóra, er tað ikki av tilvild, at Útvarpið ikki hevði heitt á nakran uttanífrá at halda minningarorð um Jógvan Adolf Johannesen.

- Vit hava havt ta skipan, at vit hava havt minningarorð um fólk, sum hava sitið í Løgtinginum ella í Landsstýrinum, sigur Jógvan Jespersen, og leggur afturat, at hetta hevur galdani uttan mun til, um fólkini hava sitið stutt ella leingi sum fólkavald.

Kringvarpsstjórin sigur tó, at tey nú hildu, at tíðin var farin frá hesum, og ístaðin hava tey valt at hava umrøður av fólkum, sum eru farin, í tíðindasendingunum. Hetta kann eisini umfata persónar, sum hava verið markantir á annan hátt í samfelagnum enn at hava tikið lut í politikki.

**Sjónvarpið gjørdi tað sama**

- Vit hava altso broytt tað til, at vit eru farin frá einum minningarorði, sum onkur annar helt, til at umrøða viðkomandi, greiðir Jógvan Jespersen frá og minnir á, at ta fyrstu tíðina hevði Sjónvarpið eisini minningarorð um politikarar, ið ikki longur vóru okkara millum, men at hetta síðani varð umskipað, so at umrøður komu ístaðin.

Jógvan Jespersen viðgongur tó, at tey høvdu ikki varnast beinanvegin, at Jógvan Adolf Johannesen var farin, og tí var umrøðan ikki fyrr enn tann dagin, jarðarferðin var.

Fyrsti politikarin, ið varð umrøddur eftir at nýggja skipanin kom í gildi í Útvarpinum, var Karolina Petersen, sála, ið var fyrrverandi landsstýriskvinna. Hon andaðist 11. oktober í fjør.